# Við børnunum til jólaleik

**Tey, sum kundu hugsað sær eina hugnaliga løtu saman við jólaspentu børnunum, áttu at bjóðað tey við til jólaleik í Dramaverkstaðnum í Havn, har næmingarnir framføra fittan barnaleik fyri stórum og smáum hesa vikuna út**





*Komið og hittið Brúsajøkul, Oxakollu og øll hini sum eru við í Leikaløtuni 2007*

**SJÓNLEIKUR**
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Leikaløtan hevur nú í mong ár verið afturvendandi tiltak fyri børn og barnsligar sálir. Næmingarnir, sum ganga til drama í verkstaðnum á veg niðan á Nabb, framføra jólaleik hvønn dag hesa vikuna, til og við sunnudagin. Tað eru næmingar hjá Hjørdis Johansen, Tjóðhild Patursson, Barbaru H í Stórustovu og Duritu D Andreassen sum leika, og Hjørdis Johansen hevur leikstjørnað, skrivað leikin, sangir og annað. Tey sum framføra eru millum 10 og 21 ára gomul.

Á skránni eru sjónleikurnir "Brúsajøkul og jólini" og "Lítli Gutti", og søgan, har áskoðararnir sleppa á pall, um tey hava hug, verður eisini søgd.

Børnini kunnu, um tey vilja, verða málað í andlitinum, eins og tey ið spæla við í søguni.

Brúsajøkul er eitt fitt lítið trøll, sum saman við vini sínum Oxakollu, kemur inn á gólvið á Dramaverkstaðnum, á veg til Kirkjubøreyn við drýlum til ommu sína. Brúsajøkul fær eitt upplivilsi inni á Dramaverkstaðnum, sum hann seint fer at gloyma. Komið og hittið Brúsajøkul, Oxakollu og øll hini sum eru við í Leikaløtuni 2007.

Sum undanfarnu árini, er hetta sýning fyri børnum saman við vaksnum, og dentur er lagdur á, at tey heilt smáu børnini eisini fáa nakað burturúr. So tað er bara at koma til Leikaløtuna og hava tað stuttligt eina løtu, siga tey í Dramaverkstaðnum!

Leikurin verður framført ur hvønn gerandisdag kl. 18:00, og leygar- og sunnudagin kl. 16:00 og 18:00.

Atgongumerkir eru at fáa í Kunningarstovuni og ein tíma undan sýning á Dramaverkstaðnum, sum liggur í brekkuni niðan á Nabb beint undir tí grønu ítróttarhøllini í Havn.

*Børnini kunnu, um tey vilja, verða málað í andlitinum, eins og tey ið spæla við í søguni*



*Tey sum framføra eru millum 10 og 21 ára gomul*

www.havsbrun.fo



## Fólk til umsitingina

### Vit søkja fólk til fjølbroytt og spennandi starv

Havsbrún er eitt av stórstu og tøkniliga mest framkomnu framleiðsluvirkjunum í Føroyum við 90 starvsfólkum og einum umsetningi uppá smáar 600 mill. kr árliga. Havsbrún framleiðir fiskamjøl- og lýsi á Mjøldeildini, og alifóður á Fóðurdeildini.

**Arbeiðsuppgávur:**
Arbeiðið fevnir um samskipan av ymsum uppgávum umframt vanligt skrivstovuarbeiði.

**Vit rokna við at tú:**
- dugir at samskipa
- hevur royndir í skrivstovuyrkinum
- hevur teldukunnleika
- kennir office forritini
- ert álítandi, ágrýtin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Lønina tosa vit um…

Vit kunnu bjóða eitt spennandi, mennandi og fjølbroytt starv í einum dynamiskum umhvørvi, har samskift verður við heimliga og altjóða marknaðin.

Við starvinum eru góðir møguleikar fyri persónligari menning.

Hevur hetta tín áhuga, so send eina umsókn skjótast gjørligt, tó í seinasta lagi 28. desember 2007. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Vilt tú hava meira at vita, ert tú vælkomin at ringja til Jústines Justinussen, fíggjarleiðara ella senda ein teldupost.

HAVSBRÚN

pf Havsbrún
FO-530 Fuglafjørður
Tlf 41 44 00
Fax 41 44 01
E-mail: jlj@havsbrun.fo

